

*Heini O. Heinesen vil fegin avloysa Bjørn Kallsø sum fiskimálaráðharra*

# Eg havi undirtøku í vinnuni

**Heini O. Heinesen dylir ikki fyri, at hann heldur enn fegin tekur av, um honum stendur í boði at gerast fiskimálaráðharri**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ja, eg kundi hugsa mær at fari út í Tinganes. Tað er tí, eg havi stillað upp aftur, fyri at fáa fiskivinnumálini upp á pláss aftur.

Tað segði Heini O. Heinesen við Rás2 leygardagin.

Hann segði, at Tjóðveldi hevði ikki tosað nærri um landsstýrisfólkini, men væntaði, at hetta fór at blíva gjørt seinni um vikuskiftið. Og Heini O. Heinesen fjalir ikki út yvir, at hann metir fiskivinnuøkið vera mest týðandi øki av øllum.

Eg var við í Vinnunevndini, tá lógin um vinnuligan fiskiskap varð gjørd, og tað hevur gingið væl líka síðani. Burtursæð frá onkrum keðiligum tingum, sum eru komin inn í lógina seinni, eitt nú møguleikin at selja fiskiloyvir fyri okursprísir, sigur Heini O. Heinesen.

Serliga innan fiskivinnuøkið hevur Heini O. Heinesen gingið ímóti lagda politikkinum hjá Tjóðveldi, og hann hevur eitt nú úttala seg um inndragingina av fiskiloyvum eins og hann ikki hevur vilja hoyrt talan um ein fiskidagabanka, ella tilfeingisbúð.

Eg helt tað var neyðugt at koma við nýggjum boðskapi upp undir valið, skuldi flokkurin yvirliva, vísir Heini O. Heinensen á.

### Bjóði meg fram

Hann heldur, at inndragingin av fiskiloyvunum í 2018 ongantíð skuldi verið komið inn í lógina.

Tað kann bara skapa ótrygd og fer at drepa allan útróður, segði Heini O. Heinesen.

Hann heldur, at vit áttu at fari aftur til gomlu skipanina, har eitt fiskiloyvi var galdandi so leingi tað var brúkt.

Tá eitt fiskiloyvi so ikki verður brúkt meiri, eigur tað at falla aftur til upprunaliga eigaran, sum er Føroya land, segði Heini O. Heinesen.

Spurdur, um hann hevði tikið av einum tlboði um at gerast fiskimálaráðharri er Heini O. Heinesen ikki í iva.

Tað er flokkurin, sum ger av, hvør skal sita í landsstýrissessunum, men eg haldi meg hava ein boðskap, sum øll vinnan tekur undir við. Eg havi samráðst við alla vinnuna, tá vit gjørdu lógina sum nevnist lógin um vinnuligan fiskiskap, og tað er eisini komið týðiliga fram á teimum valfundum, eg havi verið á fram til valið, segði Heini O. Heinesen við Rás2

# Stórur dagur fyri meg og Tjóðveldi

**Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, var væl nøgdur, tá samgongan endiliga var komin undir land. Enn hevur flokkurin tó ikki gjørt av, hvørki fólk skulu manna landsstýrið**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað gjørdist ein tungur burður at fáa skipa eina nýggja samgongu. Men endiliga beint undan løgtingsfundinum leygardagin stóð greitt, at talan verður um politiskt samstarv millum Javnaðin, Tjóðveldi og Miðflokkin.

Tjóðveldi var so smátt farið undir at viðgera spurningin um landsstýrisfólk, men tað er ein drúgv og inviklað prosess.

- Til øll týðandi stórmál hava vit eina mannagongd, har aðalstjórn, tingmanning og starvsnevnd í felag taka støðu. Tað verði seg skipan av samgongu, setan av landsstýrisfólki ella uppsigan av samgongu. Tá talan er um landsstýrisfólk geratingmanning og starvsnevnd eina innstilling til aðalstjórnina, sum síðani skal góðtaka hesa og senda hana aftur til tingmanningina til endaliga konfirmering, segði Høgni Hoydal við Rás2.



*Høgni Hoydal er væl nøgdur við, at samgongan loksins kom undir land*

Formaður Tjóðveldis vísti á, at hetta er ein gomul mannagongd, men saamstundis ein mannagongd, sum hildið verður fast við.

### Væl nøgdur

Høgni Hoydal segði, at tað var gott at hava fingið samgonguna undir land.

- Tað hava verið nógvir snávingarsteinar á vegnum, so tað er gott at hava fingið samgonguna undir land. Men tað sum er uppaftur betri er at sleppa í gongd í vissuni um, at nú verður ein nýggjur politikkur førdur, segði Høgni Hoydal.

Hann er eisini væl nøgdur við samansetingina.

- Hetta er ein stórur dagur fyri meg persónliga og ein stórur dagur fyri Tjóðveldi, at vit nú hava fingið eitt samgonguskjal, sum vit eru nøgd við. Og eina samansetting av politiskumfólkum, sum vit eisini eru nøgd við, segði Høgni Hoydal.

Hann vildi ikki siga nakað nærri um, hvørt hann sjálvur verður partur av landsstýrinum, men vísti til tær mannagongdir og tilgongdir, sum eru galdandi í flokkinum.

# Mæltu til seks landsstýrisfólk

**Stóri knúturin upp undir endan av samráðingunum var talið av landsstýrisfólkum. Tað sigur Jenis av Rana**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, segði við Rás2, at tað, sum endaði sum tann stóri knúturin upp undir endan av samráðingunum, var talið av landsstýrisfólkum.

Vit mæltu til seks landsstýrisfólk. Vit hildu tað var passandi at Tjóðveldi fekk trý, sum størsti flokkur, Javnaðurin tvey og vit eitt landsstýrisfólk, segði Jenis av Rana.

Hann segði eisini, at gjørdist talan um sjey ella átta fólk, vildu teir hava tvey, men soleiðis gjørdist so ikki.

Í staðin fyri fær Miðflokkurin so tveir týðandi formanssessir í løgtingsnevndum. Hvørjar hesar eru, er tó ikki greitt enn.



*Jenis av Rana er væl nøgdur við leiklutin, sum Miðflokkurin fær í nýggju samgonguni*

Men eftir at hava eftirmett, eru vit ógvuliga væl nøgd í Miðflokkinum, segði Jenis av Rana.

Hvørjar formanssessir Miðflokkurin kundi hugsað sær, sigur Jenis av Rana ikki ber til at siga nakað um, tí hetta skal avgerast við eitt lutakast við andstøðuna.

Tað liggur líkasum í luftini, at Miðflokkurin skal umsita fíggjarmál, og tí er í veruleikanum bert tríggjar nevndir eftir, segði Jenis av Rana, sum harvið vísti til, at sami flokkur ikki hevur bæði fíggjarmálaráðharran og formannin í fíggjarnevndini.

Málsøkini eru ikki býtt millum flokkarnar, men tað er alt sum bendir á, at Miðflokkurin fær fíggjarmál og at komandi fíggjarmálaráðharrin eitur Karsten Hansen. Tað skiltist á Jenisi av Rana á prátinum í Rás2 undan tíðindafundinum í løgtinginum leygardagin.